Føroyskir fiskifrøðingar mæla til nógv skerdan fiskiskap

Men teir taka ikki so grovliga til sum ICES. Ístaðin mælir Fiskirannsóknarstovan til, at skerjingarnar verða framdar eftir tveimum, trimum árum

FISKISKAPUR
Áki Bertholdsen

Í løtuni dúvar fiskiskapurin uppá, at árgangirnir av fiski, sum koma í stoivnin, eru stórir. Verður veiðitrýstið minkað, fæst meiri støðugur fiskiskapur, bæði í góðum og í ringum tíðum, sigur Fiskirannsóknarstovan

Fiskidagatalið eftir upsa á landgrunninum og fiskiskapurin eftir hýsu og upsa undir Føroyum eigur at minka 25%.

Tað siga fiskifrøðingarnir á Fiskirannsóknarstovuni.

Nú hevur eisini Fiskirannsóknarstovan latið landsstýrinum sítt tilmæli yvir, hvussu fiskidagatalið undir Føroyum skal vera í komandi fiskiári, sum gongur frá 1. september í ár til 31 august næsta ár.

Eitt tað fyrsta, sum Løgtingið skal gera, eftir at tingsetan er sett á Ólavsøku, er at áseta fiskidagatalið fyri tað komandi fiskiárið.

Og við tilmælið sínum eru føroysku fiskifrøðingarnir at kalla samdir við starvsfelagar sínar í Altjóða Ráðnum fyri Havrannsóknir, ICES, sum herfyri eisini mælti til at skerja fiskiskapin eftir toski, hýsu og upsa undir Føroyum 25% og meiri enn tað.

Men Fiskirannsóknarstovan ásannar samstundis, at hetta eru ógvuliga umfatandi skerjingarnar, sum mælt verður til og tí skjýtur hon upp at tær verða framdar so líðandi yvir eini tvey, trý ár.

Í ein vissan mun verða toskur, hýsa og upsi fiskað saman í einum blandaðum fiskiskapi. Samstundis eru stovnarnir væl fyri løtuni og tí mælir Fiskirannsóknarstovan til at skerjingarnar verða framdar so líðandi næstu tvey, trý árini, sigur hon í tilmæli sínum.

Samstundis mælir Fiskirannsóknarstovan til, at royndin eftir toski á Føroyabanka næsta ár ikki fer upp um árliga støðið í 1996-2002.

Fyri stóra kongafisk verður mælt til, at royndin verður 25% minni enn hon var í ár og fyri trantkongafisk verður mælt til, at royndin næsta fiskiár ikki veksur afturímóti tí, sum hon var í ár.

Leggja ov lítið upp fyri

Fiskirannsóknarstovan sigur, at í lógini um vinnuligan fiskiskap verður miðað ímóti, at árliga veiðutrýstið fyri tosk, hýsu og upsa skal vera 33% í miðal av.

Men seinastu stovnsmetingarnar vísa, at tað veruliga veiðutrýstið eftir toski er 42%.

Men eftir hýsu er tað 33%, sum ætlað og eftir upsa er tað 29%, sum er nakað minni.

– Skal lógin haldast, verður tað tí neyðugt at minka fiskiskapin eftir toski so mikið komandi fiskiár, at veiðitrýstið kemur niður á 33%.

Hinvegin metir ICES, at við einum veiðitrýsti upp á 33%, verður ov lítið lagt upp fyri fyri vánaligari tilgongd og vánaligum vakstrarlíkindum, serliga hvat viðvíkur hýsu og upsa. Í staðin fyri mælir ICES tí til, at veiðutrýstið skal vera minni enn 27% fyri tosk, minni enn 20% fyri hýsu og minni enn 22% fyri upsa.

Dúva uppá at tilgongdin er góð

Fiskirannsóknarstovan sigur, at í løtuni dúvar fiskiskapurin uppá, at góðir árgangir koma inn í stovnin.

– Stóra veiðitrýstið ger, at fiskurin hevur lítlan møguleika at verða meri enn 4-5 ár áðrenn hann antin er deyður av náttúrligum ávum ella fiskaður og tí er fiskurin yvirhøvur smáur.

– Tann ungi toskurin er vanliga á grunnum vatni, og av tí, at so lítið av eldri fiski er, brúkar toskastovnurin ikki tey djúparu økini á Landgrunninum, og tí heldur ikki alt føðiøki hjá sær, og framleiðir tí helst minni, enn hann kundi.

– Við at fiska fiskin ov ungan fæst heldur ikki full nytta av vakstrarmøguleikunum hjá toski. Av tí at tilgongdin er ymisk ár undan ári, verður fiskiskapurin eisini vera skiftandi.

– Ein orsøk til stovnrarnir eru væl fyri, er, at gróðurin hevur verið góður í nøkur ár. Men svíkur tilgongdin í meira enn tvey, trý ár, eru vit illa fyri, sigur Fiskirannsóknarstovan,.

Hon sigur, at tí er sera umráðandi at veiðutrýstið á stovnarnar minka niður á meira høskandi støði. – Úrslitini av hesum vil vera at fiskiskapurin verður meira støðugur, bæði í góðum og í ringum tíðum og at vit fáa fiskað meira av stórum fiski enn nú.

Fiskirannsóknarstovan sigur, at í 2002 byrjaði gróðurin seint, og gróðurin var lítil. Ein avleiðing av hesum er, at yvirhøvur hevur fiskurin verið rak.

Hon leggur afturat, at hóast endaligu gróðurmetingarnar ikki eru lidnar enn, bendir alt á, at gróðurin í ár er miðal.

Nøkur nógv brúkt hugtøk

Veiðitrýst er eitt mát fyri, hvussu nógvir fiskar í tali verða fiskaðir um árið burtur úr einum stovni. Veiðitrýstið verður ofta givið upp í prosentum.

Tilgongd er nøgdin av fiski í einum ávísum stovni í tali, tá ið fiskurin er so gamal, at hann vanliga byrjar at vísa seg í fiskiskapinum. Fyri tosk og hýsu undir Føroyum er tað talið á tvey ára gomlum fiski.

Gýtingarstovnur er nøgdin av fiski, sum er gýtingarførur í einum stovni,. Gýtingarstovnurin verður ofta uppgivin í tonsum.

Veiða og landing er nøgdin av fiski í vekt, ið verður fiskað. Uppi í veiðini er eisini taldur fiskur, ið verður blakaður útaftur ella á annan hátt ikki verður avreiddur, og tískil ikki er at finna í hagtølum.

Royndd, ella veiðiorka, er eitt mát fyri, hvussu hart verður fiskað, t.d. tal á fiskidøgum, troltímum, húkum, snellum og gørnum.

Fimm bólkar spæla á konsert á jóansøku

Leygarkvøldið fara fimm bólkar og einstaklingar at spæla á stórari jóansøku-konsert á Tvøroyri, teirra millumvera bæði Brandur Enni og Gestir, sum vunnu Prix Føroyar

KONSERT
Áki Bertholdsen

Prix- Føroyar vinnararnir, Gestir, verður eitt høvuðsnavn á jóansøkukonsertini konsertini á Tvøroyri leygarkvøldið. Hetta verður fyrstu ferð, at teir spæla á Tvøroyri

Suðuroy: Hetta vikuskiftið er jóansøka á Tvøroyri og eitt av teimum heilt stóru tiltøkunum verður ein konsert, sum verður leygarkvøldið og har fleiri bólkar og einstaklingar fara at framføra.

Á seinastu jóansøku høvdu tey eisini konsert, sum var sera væleydnað og ætlanin er, at hetta skal vera ein fastur táttur á hvørjari jóansøku.

Konsertin verður leygarkvøldið í skúlagarðinum á Tvøroyri og hon byrjar klokkan 19.30.

Atgongumerkið kostar 130 krónur.

Hesuferð verða fimm bólkar við.

Tveir av teimum eru teir báðir bólkarnir av Tvøroyri, One Night Stand og Black Wall.

Hesir báðir bólkarnir eru nýggir og hava tískil ikki spælt so nógv. Men fyri tað, eru tónleikarnarir ikki heilt ókendir, tí summir av teimum, sum í dag manna Black Wall, spældu fyrr í bólkinum Pikachu.

Somuleiðis fer eisini Brandur Enni, ið eisini er av Tvøroyri, á pallin.

Kendi bólkurin, Flux, er eisini á skránni, men eitt av høvuðsnøvnunum er uttan iva Gestir, sum vunnu Prix Føroyar fyrr í ár.

Hetta er fyrstu ferð, at Gestir spæla í Suðuroynni, men Flux spældi eisini á seinastu jóansøkukonsertini.

Hava One Night Stand og Black Wall ikki spælt so nógv, kann tað ikki sigast um hini trý nøvnini, Gest, Brand og Flux.

Flux geva fløgu út í næstum og tað hava teir brúkt nógva tíð uppá. Og fríggjakvøldið skulu bæði Brandur Enni og Gestir spæla á tónleikastevnuni í Nibe.

– Teir koma heim við flogfari leygardagin og koma beint til Suðuroyar við leigaðum báti at spæla á jóansøkukonsertini, sigur Poul Arni Holm, sum er ein teimum ið fyrireikar konsertina fyri Tvøroyrar Bóltfelag, sum stendur fyri tiltakinum.

Varðveita stevnudámin

Hann sigur, at endammálið við konsertini er at hava eitt fast tiltak í Suðuroynni, sum kann lokka kendar bólkar suður at spæla, tí tað eru áhoyrarar í Suðuroy ikki forvandir við.

Hann vónar eisini, at hetta kann gera sítt til at lokka fólk norðaneftir, at blíva verandi á jóansøku.

– Tað vanliga er annars, at fólk, sum koma norðaneftir, fara norður aftur beint eftir kappróðurin leygardagin og tað skerst ikki burtur, at tá hevur jóansøkan mist nakað av tí rætta stevnudáminum.

Hann vónar tí, at konsertin kann fáa fólk at blíva verandi, og tað er ikki verri enn so enn at Smyril siglur norður aftur sunnumorgunin klokkan sjey.

Strangari enn løgtingið loyvir

Navnið spillir ongan, siga vit. Men bæði navnanevndin og løgmálaráðið hildu, at eitt »c« spilti lítlu Victoriu. Hesa avgerð hevur løgtingsins umboðsmaður nú kolldømt

Tilvildarlig mynd: Jens K. Vang

Høgni Hoydal fór út um sínar heimildir, tá hann gjørdi eina strangari kunngerð um fólkanøvn, enn løgtingið gav lógarheimild til. Tað sigur Joen H. Andreassen løgtingsins umboðsmaður, sum krevur, at landsstýrismaðurin broytir kunngerðina. Samstundis ger umboðsmaðurin greitt, at lítla Viktoria saktans kann eita Victoria

NAVNALÓG
Ingi Rasmussen

»Eftir mínari meting er landsstýrismaðurin farin út um sína heimild«.

Tað er kontanta niðurstøðan hjá løgtingsins umboðsmanni, Joen H. Andreassen, sum hevur viðgjørt eina kæru um uppkalling sambært navnalógini.

Landsstýrismaðurin er Høgni Hoydal, og málið hevur eina forsøgu í Løgtinginum, sum áður hevur fingið fleiri politikarar at ressast við.

Ítøkiliga málið snýr seg um, at eini foreldur vilja uppkalla dóttrina eftir abbanum, sum æt Victor. Foreldrini biða serligu navnanevndina um loyvið, tí tey vilja brúka bókstavin »c«, ið ikki verður roknaður sum føroyskur.

Navnanevndin noktar teimum hetta við tilvísing til, at bara tá talan er um »beinleiðis uppkalling«, kann undantak vera givið frá regluni um, at nøvn skulu vera í samljóði við føroyskar málreglur. Navnanevndin sigur tað ikki vera beinleiðis uppkalling, tí abbin æt Victor og ikki Victoria.

Foreldrini kærdu avgerðina fyri løgmálaráðið, sum gav navnanevndini viðhald. Foreldrini vóru kortini vís í sínum søk, og tí royndu tey løgtingsins umboðsmann, sum nú hevur kolldømt niðurstøðurnar hjá bæði navnanevndini og løgmálaráðnum.

Løgtingið linkaði

Forsøgan í málinum er politisk og gongur fyri seg í Løgtinginum.

Í 1999 setti Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, eina nevnd at endurskoða løgtingslógina um fólkanøvn, ið varð hildin at vera ov avmarkandi. Nevndin læt álit frá sær, og við støði í hesum varð uppskot lagt fyri løgtingið.

Rættarnevndin býtti seg í tveir bólkar, og meirilutin varð meiri lagaligur í sínum tilmæli til løgtingið, enn landsstýrismaðurin ætlaði. Tá landsstýrismaðurin eftir aðru viðgerð í tinginum sá skriftina á vegginum, sum segði at Løgtingið við greiðum meiriluta tók undir við lagaligu tonkunum hjá Rættarnevndini, tók hann uppskotið aftur.

Tað eydnaðist kortini trimum tingfólkum at leggja lagaligu sjónarmiðini fram sum eitt nýtt uppskot, og tað uppskotið samtykti Løgtingið við greiðum meiriluta. 21 atkvøddu fyri og 9 ímóti.

Uppskotið hjá Høgna Hoydal hevði ta avmarking, at undantak ikki kundu gerast í sambandi við uppkalling, um navnið frammanundan fanst í føroyskum sniði. Løgtingið ynskti tó at ganga longri, soleiðis at hendan avmarking ikki bleiv tikin við í lógina.

Fólk í ættini

Sostatt samtykti Løgtingið eina linking í mun til uppskotið hjá landsstýrismanninum.

Í høvuðsheitum svaraði uppskotið til tað, sum landsstýrismaðurin legði fram, tó við tí undantaki, at navnanevndin kann víkja frá regluni um føroyskar málreglur, tá uppkallað verður eftir fólki í ættini. Í somu vending varð álagt landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um undantøk í kunngerð.

Landsstýrismaðurin nýtti ta heimildina, sum løgtingið hevði givið honum, til at gera eina kunngerð. Tað gjørdi hann í ríkiligt mát, tí sambært løgtingsins umboðsmanni, fór hann út um heimildirnar í lógini. Høgni Hoydal skuldi kunngera, at undantøk kunnu gerast fyri at uppkalla eftir fólkum í ættini. Hesa heimild brúkti hann til at siga, at talan skal vera um »beinleiðis uppkalling«.

Victoria fall fyri hesi reglu, tí abbin æt sum kunnugt Victor og ikki Victoria. Hesum finst umboðsmaðurin harðliga at.

»Hvørki galdandi lóg, viðmerkingarnar ella upprunaliga uppskotið frá landsstýrismanninum nevna orðið beinleiðis í sambandi við uppkalling«, sigur løgtingsins umboðsmaður. »Um ætlanin hjá løgtingsmeirilutanum var at avmarka undantøkini til beinleiðis uppkalling, hevði tað ikki verið serliga tyngjandi at sett hesa avmarkingina inn í sjálvan lógartekstin,« leggur hann afturat.

Viktoria við c

Álvarsama niðurstøðan hjá løgtingsins umboðsmanni er, at landsstýrismaðurin er farin út um sínar heimildir, tá undantaksreglan verður skerd. Avgerðirnar hjá navnanevndini og løgmálaráðnum eru sostatt tiknar á skeivum grundarlagi, og umboðsmaðurin heitir á løgmálaráðið um taka málið til nýggja viðgerð.

Sostatt sleppur Viktoria helst at eita Victoria.

Uppaftur álvarsligari er tað, at umboðsmaðurin mælir landsstýrismanninum til at broyta kunngerðina soleiðis, at hon verður í samsvari við lógina. Hesa avgerð hevur hann samstundis boðað løgtinginum frá.

Landsstýrismenn fáa blankokekkar

Ein kunngerð kann vera sum ein blankokekkur. Tí er málið um navnalógina eitt stórt prinsippmál, sum røkkur langt inn í føroyska lóggávu, heldur aðalstjórin í løgmálaráðnum

LÓGGÁVA
Ingi Rasmussen

Málið um navnalóggávuna, sum umboðsmaðurin júst hevur tikið avgerð um, røkkur nógv longri enn til lítlu Victoriu.

Tað er nevniliga vorðin nærum siðvenja, at lóggávuvaldið í Føroyum, Løgingið, letur tað upp í hendurnar á landsstýrismanninum at gera reglur og kunngerðir, sum útgreina lógir.

– Avgerðin hjá umboðsmanninum avdúkar eitt stórt og ógvuliga prinsipielt mál. Eitt er avgerðin hjá umboðsmanninum í ítøkiliga málinum. Um hon er rætt ella skeiv, kann helst diskuterast, men avleiðingarnar kunnu gerast ógvusligar fyri føroyska umsiting, sum ger nógvar kunngerðir, sigur Rúni Joensen, aðalstjóri í løgmálaráðnum.

Løgmálaráðið hevur ikki tikið støðu til ítøkiliga málið við navnalógini. Men yvirhøvur vísir tað vandan við, at landsstýrismenn fáa heimild at útgreina lógir.

– Generelt er hátturin, sum løgtingið ofta lóggevur uppá, ein stórur trupulleiki. Við tað, at tað so ofta verður latið til landsstýrismannin at gera reglur og kunngerðir, fær hann ofta ein blankokekk. Tað kann vera ein trupulleiki, tí ein lóg er ikki altíð líka eyðsæð, sigur Rúni Joensen.

Hann vísir á, at øll umsitingin kann vera rakt av avgerðini hjá umboðsmanninum, tí bæði í fiskivinnumálum og vinnumálum verður nógv stýrt eftir kunngerðum, sum Løgtingið hevur givið landsstýrismonnum heimild til at gera.